# Landsfelag Pensjónista

21. apríl 2023

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Yyvirlit – evni á skrá

- Haldføri
- Íløgur fyri at lofta gongdini?
- Gongd í fólkapensjón samanborið við lønarvøkstur
- Støðan hjá pensjónistum samanborið við løntakarar
- Vísa farnu broytingar eitt økt útboð at arbeiðsmegi?

Føroyski búskapurin er ikki haldførur!

# Gongdin higartil

**Landskassaúrslitið RLÚ, vanligir postar, 1998-2024** **Mynd I 16**




**Viðm.:** RLÚ í leypandi prísum og sum brøkur av BTÚ. 2022-2024 eru metingar.
**Kelda:** Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

**Almennar nýtsluútreiðslur í mió. kr. og árligur %-vøkstur, 2000 til 2024** **Mynd I 13a**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2000-2021, 2022-2024 eru egnar metingar.

**Tal av løntakarum og fulltíðar arbeiðsleysum, árstíðarjavnað, jan-08 til jan-23** **Mynd I 19a**




**Kelda:** Hagstova Føroya.

**Eldrabylgja, 1985-2061**




**Viðm.:** 2021-2061 eru framroknaði tøl.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Demografiskar avbjóðingar

**Tal av fólki í arbeiðsførðum aldri fyri hvønn pensjónist, 1985-2061** **Mynd I 17b**




**Viðm.:** 2021-2061 eru framroknaði tøl.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Demografiskar avbjóðingar

**Einstaklinga útreiðslur til nýtslu býtt á aldur**




**Viðm.:** Nýtsluútreiðslur fevna um útreiðslur til eitt nú eldrarøkt og barnaansing. Nýtsluútreiðslur fevna ikki um veitingar, so sum fólkapensjón, heilsutrygd og ÚS.
**Kelda:** Hagstova Føroya (COFOG), DREAM, Finansministeriet, Landsfólkayvirlitið, Almannaverkið, Tórshavnar kommuna, Roðin, NBH, Studni, Gjaldstova Føroya (LKS), Undirvísingarstýrið.

**Tal av 80+ og 90+ ára gomlum í búfjøld, 1985-2060**




**Viðm.:** 2021-2061 eru framroknaði tøl.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Íløgur fyri at lofta gongdini?

# Lítlar íløgur í almannamál

**Íløgupostar hjá landsfyrisiting, 1998-2021** **Mynd I 14a**




**Viðm.:** Umframt nýgerð og -bygging, verður viðlíkahald við livitíð longri enn eitt ár roknað sum íløga. Teir smæstu COFOG bólkarnir verða í myndini savnaðir undir eitt. Hesir íløgubólkar eru almennar samfelagstænastur, frítíð og mentan, umhvørvisvernd, lóg og trygd, og Íbúð og
**Kelda:** Hagstova Føroya (COFOG).

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Eldraøkið - Dømi úr “Í góðum hondum”




Álitið “**í góðum hondum**” frá 2022

# Eldraøkið - Dømi úr “Í góðum hondum”

**Nógvir fyrimunir eru við eldrabústøðum:**

- Bústaðurin er egnaður til rørslutarnað, og fólk kunnu tí vera nógv longur heima, áðrenn tey fara á røktarheim.

•Tey eldru koma at búgva, har onnur eldri búgva. Hetta økir um trivnaðin, minkar um vandan fyri einsemi og gevur møguleikar fyri felags tiltøkum og felags loysnum.

- Røktin gerst meira effektiv, um fleiri eldri búgva saman, millum annað tí minni tíð fer til flutning.

•Eldri fólk sleppa undan at viðlíkahalda og upphita eini stór sethús.

•Størri útboð av bústøðum, so sethús gerast tøk til barnafamiljur.

•Skynsamari nýtsla av bústøðunum, tí fermetrarnir kunnu tillagast tørvinum, so hvørt, sum fólk eldast.

| 2020 | Danmark | Føroyar | Bornholm |
|---|---|---|---|
| Eldrarøkt, rakstur | 46.900.000 | 531.000 | 390.000 |
| Tal av fólkum, 80+ | 282.000 | 2.372 | 2.770 |
| Rakstur pr. fólk | 166.000 | 224.000 | 141.000 |

Álitið “**Í góðum hondum”** frá 2022

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Gongd í fólkapensjón samanborið við lønarvøkstur

# Gongdin í realari inntøku

**Realur vøkstur í almennu fólkapensjónini og lønini hjá útvaldum lønarbólkum, 1993-2022**




**Viðm.:** Fólkapensjón eftir skatt er almenna veitingin fólkapensjón íroknað samhaldsfasta til stakan pensjónist uttan aðra inntøku. Løn eftir skatt (Arbeiðarafelagið) er løn hjá persóni, ið er løntur eftir høvuðssáttmála hjá Føroya Arbeiðarafelag við 5 ára starvsroynd. Løn eftir skatt (Starvsfelagið) er løn hjá persóni, ið er løntur eftir lønarflokki 4, stig 7 (heildarstig 16) sambært sáttmála hjá Starvsfelagnum. Nýttir skattir eru frá galdandi skattatalvum í einstaka árinum. Fyri kommunuskatt er eitt miðal fyri kommunurnar nýtt, somuleiðis við kirkjuskattinum. Í árunum undan 2009 er sjúkrakassagjaldið í Tórshavnar kommunu frá 2002 – 2009 nýtt. Kringvarpsgjaldið er skrásett sum skattur frá 1997 og fram. Barnafrádráttur er ikki íroknaður.
Brúkaraprístalið er drigið frá lønini/fólkapensjónini og síðani er gongdin frá 1993-2022 roknað sum indeks.
**Kelda:** Almannamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Føroya Arbeiðarafelag, Starvsfelagið, Taks og egnar útrokningar.

# Støðan hjá pensjonistum samanborið við løntakarar

# Inntøkan hjá pensjónisti eftir skatt

**Tøk inntøka við givnari ársløn hjá arbeiðandi í arbeiðsfjøld og pensjónist uttan aðra inntøku**




**Viðm.:** Myndin tekur útgangsstøði í støkum pensjónisti við fólkapensjón íroknað samhaldsfasta uttan aðra inntøku. Grundupphædd í pensjónini er skattafrí, og fólkapensjónistar gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld fyri uttan heilsutrygd (175 DKK/mðr. + 0,7% av skattskyldugari inntøku). Harafturat er kringvarpsgjaldið hjá pensjónisti 50 kr./mðr., meðan persónur í arbeiðsfjøld skal gjalda 150 DKK/mðr. Ársinntøka hjá arbeiðsfjøld er A-inntøka. Barnafrádráttur er ikki íroknaður.
Landsskattur er ásettur eftir skattatalvum hjá Taks, arbeiðsmarknaðargjøld á 5% umframt heilsutrygd. Kommunuskattur er ásettur á 20% og kirkjuskattur er ásettur á 0,6%.
**Kelda:** Taks, Almannamálaráðið.

# Inntøkan hjá pensjónisti eftir skatt

**Tøk inntøka við givnari ársløn hjá arbeiðandi í arbeiðsfjøld og pensjónisti (við mótrokning)**




**Viðm.:** Myndin tekur útgangsstøði í støkum pensjónisti við fólkapensjón íroknað samhaldsfasta. Grundupphædd í fólkapensjónini er skattafrí, men verður mótroknað 20% eftir aðra inntøku á 45.000 DKK, og hareftir verður viðbót mótroknað við 25%. Arbeiðsløn hjá pensjónistum er sett at hækka við 15% eftir pensjónsaldur er rokkin (flestu alment løntu hava sáttmálasetta eftirløn á 15%), hetta tí at viðkomandi ikki framhaldandi skal spara upp í tvungnari egineftirløn. Ársinntøka hjá arbeiðsfjøld er A-inntøka. Barnafrádráttur er ikki íroknaður.
Fólkapensjónistar gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld fyri uttan heilsutrygd (175 DKK/mðr. + 0,7% av skattskyldugari inntøku). Harafturat er kringvarpsgjaldið hjá pensjónisti 50 kr./mðr., meðan persónur í arbeiðsfjøld skal gjalda 150 DKK/mðr. Landsskattur er ásettur eftir skattatalvum hjá Taks, arbeiðsmarknaðargjøld á 5% umframt heilsutrygd. Kommunuskattur er ásettur á 20% og kirkjuskattur er ásettur á 0,6%.
**Kelda:** Taks, Almannamálaráðið**.**

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Inntøkan hjá pensjónisti eftir skatt

**Samanseting av tøkari inntøku hjá pensjónisti (við mótrokning)**




**Viðm.:** Myndin tekur útgangsstøði í støkum pensjónisti við fólkapensjón íroknað samhaldsfasta. Grunduppphædd í pensjónini er skattafrí, men verður mótroknað 20% eftir aðra inntøku á 45.000 DKK, og hareftir verður viðbót mótroknað við 25%. Fólkapensjónistar gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld fyri uttan heilsutrygd (175 DKK/mðr. + 0,7% av skattskyldugari inntøku). Landsskattur er ásettur eftir skattatalvum hjá Taks, kommunuskattur er ásettur á 20% og kirkjuskattur er ásettur á 0,6%. Harafturat er kringvarpsgjaldið hjá pensjónisti 50 kr./mðr.
Ársinntøka fevnir um alla skattskylduga inntøku hjá pensjónisti, ið ikki eru fólkapensjón ella samhaldsfasti.
**Kelda:** Taks, Almannamálaráðið.

BÚSKAPARRÁÐIÐ

## Vísa farnu broytingar eitt økt útboð av arbeiðsmegi?

# Minkandi arbeiðsluttøka hjá pensjónistum

**Arbeiðsfjøld 67-74 ár skift á arbeiðsmarknaðarstøðu og 1 ára aldur (2019 og 2022)**

| | 2019 | | | 2022 | | | Broyting 2019-2022 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Arbeiðs fjøld | Fólkatal | Arbeiðs-fjøld í % | Arbeiðs fjøld | Fólkatal | Arbeiðs fjøld í % | Arbeiðs fjøld | Fólkatal | Arbeiðs fjøld í % |
| **67 ár** | 360 | 524 | **69** | 326 | 538 | **61** | -34 | 14 | **-8** |
| **68 ár** | 316 | 543 | **58** | 277 | 514 | **54** | -39 | -29 | **-4** |
| **69 ár** | 282 | 542 | **52** | 272 | 547 | **50** | -10 | 5 | **-2** |
| **70 ár** | 221 | 557 | **40** | 228 | 504 | **45** | 7 | -53 | **6** |
| **71 ár** | 184 | 495 | **37** | 182 | 524 | **35** | -2 | 29 | **-2** |
| **72 ár** | 135 | 478 | **28** | 158 | 526 | **30** | 23 | 48 | **2** |
| **73 ár** | 111 | 419 | **26** | 129 | 534 | **24** | 18 | 115 | **-2** |
| **74 ár** | 98 | 411 | **24** | 112 | 469 | **24** | 14 | 58 | **0** |
| **Tilsamans** | 1.707 | 3.969 | **43** | 1.684 | 4.156 | **41** | -23 | 187 | **-2** |

**Kelda:** Hagstova Føroya

# Niðurstøða

Yvirkskipað, leita fram og seta í verk tilmæli, sum eru komin frá serfrøðingabólkum:

- Fíggjarpolitisk regluverk (2015)
- Pensjónsnýskipan (2009)
- "Í góðum hondum" (2022)
- Betri rakstur: H-bygningur (2016)
- Brúka fyrimunir við at landið er knýtt saman
- ...

| | Hækking av pensjónsaldri | Pensjónsaldur |
|---|---|---|
| 2012 | 0,5 | 67,5 |
| 2017 | 0,5 | 68 |
| 2022 | 0,5 | 68,5 |
| 2027 | 0,5 | 69 |
| 2032 | 0,5 | 69,5 |
| 2037 | 0,5 | 70 |
| 2042 | 0,5 | 70,5 |
| 2047 | 0,5 | 71 |

Álitið "**Pensjónsnýskipan**" frá 2009

Hvussu fíggja vit pensjónsøkið frameftir?

- Flyta okkum frá "rullandi skipan" til eginfígging av pensjón
- Hækka pensjónsaldur
- Raðfesting av íløgum innan almannaøkið. Íløgur í karmar og tøkni, harvi rationalisering/differentiering av eldraøkinum.

Takk fyri